

*Eftir at kollveltingin var fallin, varð hetta minnismerki reist yvir teir 59 úr stjórnini hjá Haile Selassie keisara, sum vórðu dripnir í 1974 og blakaðir í eina hópgrøv*



*Katrin og Gisli Arnkelsson arbeiddu saman við Elsu í Konso í 1960-unum.* ***Børnini eru eftir aldri:*** *Guðlaugur, Valgerður, Bjarni, Karl Jónas og Kristbjørg. Øll hava tey verið trúboðarar í Etiopia. Tann yngsta Kamilla var ikki fødd, tá henda myndin varð tikin í 1967*

Teir flestu vóru ungir dreingir.

Báðir partar hava í friði samráðst og eru vorðnir samdir í mongum førum um, hvussu landið nú skuldi stýrast og byggjast upp.

Merkisvert var at síggja, at teir sum fingu týðandi størv runt í landinum av "gomlu stjórnini", nógvir vóru noyddir at taka við starvinum móti sínum vilja, nú sluppu at vera í friði í landinum. Teir verða kortini skiftir út og nýggir valdir inn í tey ymsu størvini sum frá líður.

## Bíbliur úr Etiopia til Russlands

Sum nevnt sendi Russland eisini fólk til Etiopia at hjálpa til at avkristna fólkið. Sum vit vita, hava tey kristnu í Ruslandi livað undir trongum korum, og tað hevur verið torført hjá fólki at fáa fatur í Bíblium. Tvær ferðir hendi tað, tá ið eg var inni í bókhandlinum hjá Bíbliufelagnum i Addis Abeba og skuldi keypa bíbliur til sjúkrahúsið í Arba Minch, at russarar vóru inni har.

Tá ið teir vóru úrfarnir, spurdi eg hann, sum var í handlinum, hvat teir vildu her.

Jú, teir vildu hava bíbliur á russiskum máli. Bókahandilin seldi nógvar russiskar bíbliur, sum teir sendu heim til Russlands til vinir og kenningar.

Eg undraðist og kom at hugsa um tað, sum stendur hjá Jesaja profeti:

*Tí at hugsanir mínar eru ikki hugsanir tykkara, og vegir tykkara eru ikki vegir mínir. Nei, sum himmalin er hægri enn jørðin, soleiðis eru vegir mínir hægri enn vegir tykkara og hugsanir mínar hægri enn hugsanir tykkara.*

Á sjúkrahúsinum í Arba Minch seldu vit nógvar Bíbliur á amahariskim máli fyri rímiligan prís.

Fólk sótu ofta úti á plássum, har tey kendu seg trygg. Har lósu tey bíbliuna. Orðið var sáað og Gud gevur ávøkst.

# Mugu drepa fyri at kunna fáa konu

**Tað eru enn tjóðflokkar, sum liva í myrkri. Eitt dømi er gudjifólkið, sum býr eystanfyri okkum**

Markið millum Gudjilandspartin og Gamo Gofa landspartin, har eg virkaði, er ikki langt burtur. Fram við markinum liggja gudjimenn og lúra við byrsum og knívum. Í samfelag teirra hevur gjøgnum øldir verið ein óskrivað lóg, sum sigur, at teir fyri at kunna giftast helst skulu hava dripið annaðhvørt eina leyvu ella ein mann úr einum øðrum tjóðflokki, sum skuldi vera eitt krígssinnað fólk. Tí gekk hetta nógv útyvir fólkið í Konso, sum var roknað fyri at vera ein "krígstjóð!" Hava menninir dripið onkran slíkan, verða teir roknaðir sum hetjur og sæddir upp til av fólkinum í samfelagi teirra.

Summar gentur eggja dreingirnar upp, og spyrja um teir eru "konufólk", tí teir hvørki hava dripið leyvu ella mann! Hetta vilja teir ikki hava sitandi á sær og fara tí – kortini ikki allir av góðum huga – í herferð móti ósekum fólki, sum gongur millum bygda. Ítøkiliga prógvið fyri "avrikið" er avskornu kynsgøgnini hjá dripna manninum. Vit fingu eina ferð á sjúkrahúsið í Arba Minch ein blaðungan drong, sum hevði fingið kynslutirnar avskornar í livandi lívi! Tað var ikki tespuligt.

## Taddewos slapp undan

Taddewos var evangelistur á sjúkrahúsinum í Arba Minch.

Eg hevði hoyrt, at gudjimenn ætlaðu eina ferð at drepa hann, men at hann í ítarstu neyð slapp við lívinum.

Eg bað hann siga mær frá hesum tilburði og hann greiddi soleiðis frá:

Eg var 18 ár, tá ið hetta hendi í 1984. Vinmaður mín og eg vóru á veg til gongu út í eina bygd til eitt møti. Vit gingu hvør aftaná annan. Meðan vit ganga og práta saman, smellur eitt byrsuskot millum okkum báðar. Vit hvukku við og hugdu eftir, hvaðani skotið kom. Tá komu tveir gudjimenn við hvør síni byrsu úr skóginum, og aftaná teir koma tveir aðrir við hvør sínum longum knívi.

Vit settu í renningarlop. Eg helt áfram eftir vegnum, og vinur mín helt inn í skógin. Í hølunum á hvørjum okkara var ein maður við byrsu og ein við knívi.

Eg rann so skjótt, eg var mentur. Í tí annar lyfti armin við knívinum og skuldi stinga meg, rendi eg fótin móti onkrum og datt. Eg var komin nær eini stórari á, so í staðin fyri at reisa meg upp, rullaði eg meg frameftir vegnum og í ánna.

Ikki dugdi eg at svimja, so eg fór til botns í ánni. Tá ið eg flotnaði upp aftur, stóð maðurin við knívinum í aðrari hondini og helt sær við hinari í tað síða grasið við áarbakkan. Hann lyfti hondini við knívinum og skuldi stinga meg, men tá fór eg undir aftur.

## Bjargaður við Guðs hjálp

Streymurin var nógvur, og hann førdi meg omaneftir ánni. Tá bað eg til Jesus undir vatninum: "Jesus, eg eri ein syndari, tak meg til tín."

Nú var ein bugur í ánni, og eg varð slongdur fram móti áarbakkanum. Eg kom uppundan og fekk tikið í grasið.

Eg hugdi rundan um meg. Tað var skýming, men eg sá ongan. Eg bað aftur: "Gud! Gudjimaðurin fekk ikki tikið lívið av mær, heldur ikki eri eg druknaður í ánni. Her eri eg, Jesus. Send onkran, sum kann koma mær til hjálpar." Eg lá har í ánni og bíðaði eftir hjálp.

Knappliga hoyrdi eg billjóð. Hetta var dagligi bussurin úr Addis Abeda, men hann koyrdi framvið uttan at ansa eftir mær.

So hoyrdi eg aftur billjóð. Eg krøkti meg í grasið og kom uppá turt. Nú rann eg móti vegnum og stillaði meg mitt á vegin. Eg veittraði og bað hann stegða, men hann floytaði bara og koyrdi framvið.

Í skýmingini sá eg nú ein mann við byrsu og nøkur fólk aftaná honum koma móti mær. Eg ivaðist ikki í, at hetta var ein av gudjimonnunum, og eg leyp aftur í ánna.

Aftur fór eg bóltandi oman eftir ánni við streyminum. Tá ið eg kom á føtur eina ferð, sá eg mannin við byrsu koma rennandi eftir áarbakkanum. Hann leyp útí og tók um meg.

Eg helt mína síðstu stund vera komna. Eg græt og rópti til Guð.

"Ver ikki ræddur, ver ikki ræddur," segði hann. Vit eru komnir at hjálpa tær. Gudjimenninir eru farnir. Vit hoyrdu skotið, tí er vit komnir.

Eg trúði honum als ikki. Helt hann bara halda meg fyri gjøldur. Hann dró meg uppá turt. Hini, sum høvdu fylgt honum, vóru nú komin. Øll hálsfevndu meg og bóðu meg ikki vera ræddan, tí nú var eg bjargaður.

Eg var so skelkaður, at eg bert græt og fekk ikki orðið upp.

Tveir menn leiddu meg til bygdina Djamo, har møti var, sum eg skuldi til. Tá ið vit komu fram var møtið byrjað. Táið tey hoyrdu um tað, sum var hent mær, helt møtið fram sum eitt takkar- og lovsongsmøti til Guds, sum hevði bjargað mær. Eg fekk turr klæði at fara í, og tey tóku sær væl av mær.

Áðrenn hesa hending, hevði eg stundum hugsað um at tæna Jesusi við teimum evnum, sum hann hevur givið mær. Nú gjørdist hetta mítt størsta ynski.

## Gjørdist evangelistur

Taddewos hevur nú virkað sum evangelistur á sjúkrahúsinum í eini 20 ár og er framvegis í hesum starvi. Tað, sum eyðkennir hann er, at hann er trúfastur í tænastuni. Tey eru ikki fá her á sjúkrahúsinum, sum eru komin til trúgv av hansara vitnisburði.

Vinur hansara varð forfylgdur av hinum báðum gudjimonnunum. Teir skutu eftir honum og raktu hann í hondina. Men hann slapp eisini heilskapaður burtur úr tí.

Hetta hendir enn. Tað er ikki sjáldan, at vit frætta um menn, sum eru dripnir av gudjimonnum. Ein lítil partur av gudjifólkinum hevur tikið ímóti gleðiboðskapinum.

Taddewos er nú giftur, og hann eigur trý børn.



*Taddewos varð nærum fyribeindur av gudjimonnum, sum skuldu vísa seg sum menn við at drepa mann úr øðrum tjóðbólki*